# Reglur um stuðul til føroyskt vísindastarv

## Innleiðing

Vísindagrunnur Føroya Sparikassa varð settur á stovn í 1986 við endamáli *at veita fíggjarstuðul til vísindaliga gransking av føroyskum evnum, til fyrireiking og útgávu av vísindaverkum um somu evni og í aðrar mátar stuðla føroyskt vísindastarv*. Í sambandi við navnaskifti hjá Føroya Sparikassa til EIK, skifti Vísindagrunnur Føroya Sparikassa eisini navn til Eik Vísindagrunnurin.

Leiðslan í Eik hevur á heysti 2014 gjørt av at avtaka grunnin. Stýrið fyri Eik Vísindagrunnin heitti á Granskingarráðið um at yvirtaka og umsita tær ognir, sum eru í grunninum á besta hátt við støði í endamáli grunsins. Stýrið mælti til, at skipanin frameftir fyrst og fremst skal stuðla útgávu av javnlíkamettum ("peer reviewed") vísindaverkum. Granskingarráðið kann seta nærri reglur fyri nýtslu av fænum úr grunninum og fyri hvør skal meta um, hvør skal fáa stuðul.

§ 1.

Eik Vísindagrunnurin, sum við fundarsamtykt 9. desember 2014 er tikin av, hevur í sambandi við avtøkuna avhent fæ grunsins, kr. 1.022.696,24, til Granskingarráðið at umsita.

Fæið úr Eik Vísindagrunninum, áljóðandi kr.1.023.739,74 flytingardagin 2. juli 2015, stendur á kontu 9181 472.740.3. í EIK til hægstu renting.

§ 2.

Peningurin skal fyrst og fremst verða nýttur sum stuðul til útgávu av javnlíkamettum (peer reviewed) vísindaverkum, ið stuðla føroyskt vísindastarv.

Við javnlíkameting er at skilja faklig meting eftir viðurkendum akademiskum siðvenjum.

Sum vísindaverk eru at rokna

1. greinar, sum verða givnar út í open access tíðarritum.
2. bøkur, sum monografiir, doktararitgerðir og greinasøvn.

Í øðrum lagi ber til at stuðla øðrum átøkum, sum lúka treytirnar í uppruna endamáli grunsins: *"at veita fíggjarstuðul til vísindaliga gransking av føroyskum evnum, til fyrireiking og útgávu av vísindaverkum um somu evni og í aðrar mátar stuðla føroyskt vísindastarv"*.

Fyri best at stuðla menning av føroyskum vísindastarvi er stuðulin serliga ætlaður yngri granskarum, sum arbeiða við vísindaevni av týdningi fyri Føroyar, men sum enn ikki hava fastar karmar til sítt virksemi.

§ 3.

Stuðul kann bert verða játtaður sambært umsókn.

Granskingarráðið ásetir treytir, stuðulsupphæddir v.m.

Granskingarráðið almannakunnger stuðulsmøguleikan, treytir fyri stuðli og ásetingar um stuðulsupphæddir á gransking.fo.

§ 4.

Granskingarráðið tekur endaliga avgerð um at játta stuðul til ásetta endamálið.

§ 5.

Serstaka kontan í Betri Banka til stuðul til vísindaliga útgávu o.l. verður skrásett í FSL og verður saman við skrivstovuhaldi Granskingarráðsins grannskoðað av Landsgrannskoðanini.

§ 7.

Hesar reglur eru í gildi til eingin peningur er eftir á kontuni til útgávu av vísindaverkum o.l.

Samtykt á fundi í Granskingarnevndini tann 22. oktober 2015

Smávegis broytingar samtyktar á fundi í Granskingarnevndini tann 5. desember 2019

Eftir at Granskingarnevndin varð avtikin við lóg við gildi frá 1.1.2021 varð ábyrgdarbýtið fyri skipanina tillagað nýggja bygnaðin. Reglurnar vóru dagførdar av fyrisiting Granskingarráðsins 2. oktober 2023.

| | |
|---|---|
| Annika Sølvará | Maria Húsgarð |
| stjóri | fulltrúi |